# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Myndugleikarnir brúka kúlur ístaðin fyri atkvøðuseðlar, og so ber ikki til at fáa eitt rættvíst úrslit*

*(Morgan Tsvangirai)*

# Ferja við 845 umborð sakk



*Vanlukkan við »Princess af Stars« hevur helst kostað meiri enn 800 mannalív*
*Mynd: Polfoto*

**Myndugleikarnir í Filipsoyggjunum stúra fyri, at meiri enn 800 doyðu, tá „Princess of Stars“ fór á land, holvdist og sakk leygarkvøldið**

Í morgun vóru bara 32 fólk funnin á lívi, og umleið 150 vóru funnin deyð eftir vanlukkuna við filipinsku oynna Sibuyamleygarkvøldið.Nógvur vindur, ringur sjógvur og gloprarregn gera bjargingararbeiðið trupult. Sambært reiðarínum vóru 724 ferðafólk við „Princess of Stars“, og manningin taldi 121.

Tey bjargaðu hava greitt frá, at alt hendi ógvuliga skjótt, og at fleiri fingu als ikki stundir at fara til bjargingarbátarnar. Harafturat var so ringur sjógvur, tá vanlukkan hendi, at fleiri av bjargingarbátunum holvdust, tá teir komu á sjógvin.

Tropiska ódnin Fengchen hevur herjað Filipsoyggjarnar um vikuskiftið, og fleiri hava spurt, hvussu tað bar til, at ferjan yvirhøvur sigldi í tí ringa veðrinum. Millum annað er komið fram, at „Princess of Stars“ slapp at fara frá bryggjuni í Manila fríggjakvøldið, hóast veðurmenninir høvdu boðað frá illveðri. Myndugleikarnir hava eisini funnist at reiðarínum, sum eitur Sulpicio Lines, og fyribils hava hinar 21 ferjurnar hjá reiðarínum fingi forboð fyri at sigla.

### Kannast til botns

- Tað er eingin ivi um, at reiðaríið hevur alla ábyrgd av vanlukkuni, sigur Elena Bautista, aðalskrivari í flutningsmálaráðnum í Manila, við Reuters.

Filipinski forsetin, Gloria Arroyo, hevur kravt, at vanlukkan verður kannað til botns. Hon vil hava at vita, hví ferjan fór avstað, samstundis sum ein tropisk ódn var á veg. Forsetin vísir á, at ferjur hjá øðrum reiðaríum vórðu liggjandi við bryggju.

Filipinska sjóverjan sigur, at „Princess of Stars“ var á veg inn undir land at kroka, tá skipið fekk maskinskaða. Sambært sjóverjuni hava fólk, sum sluppu livandi frá vanlukkuni, greitt frá, at ferjan sakk eitt korter eftir, at maskinurnar vóru steðgaðar.

# Tsvangirai tók seg aftur

**Tað er ov vandamikið at gjøgnumføra forsetavalið í Zimbabwe, sigur andstøðuvalevnið Morgan Tsvangirai, sum tí hevur tikið uppstillingina aftur. Stjórnin sigur, at hann er bangin fyri at tapa**



*Morgan Tsvangirai tekur seg aftur sum forsetavalevni í Zimbabwe*
*Mynd: Polfoto*

- Hetta er ikki eitt val við atkvøðuseðlum, tí myndugleikarnir hava valt at brúka kúlur ístaðin fyri, segði Morgan Tsvangirai, tá hann í gjár kunngjørdi, at hann hevði gjørt av at taka seg aftur sum valevni til forsetavalið í Zimbabwe, ið verður fríggjadagin. Høvuðsorsøkina sigur hann vera, at tað ber ikki til at fáa eitt rættvíst valúrslit.

- Vit í andstøðuflokkinum kunnu ikki biðja fólk fara á val tann 27. juni, tá vit vita, at tað kann kosta teimum lívið. Vit fara ikki at taka lut í einum vali, sum er merkt av harðskapi, og sum í veruleikanum ikki er nakað val, segði Morgan Tsvangirai. Samstundis bað hann ST og afrikanska eindarfelagsskapin steðga tí, sum hann kallaði „eitt fólkamorð“ í Zimbabwe.

Andstøðuflokkurin vil vera við, at umleið 70 stuðlar hjá flokkinum hava latið lív í ágangi, sum viðhaldsmenn hjá Robert Mugabe, forseta hava staðið fyri, og sum hevur til endamáls at ræða fólk frá at velja andstøðuvalevnið. So seint sum í gjár lupu umleið túsund viðhaldsfólk hjá Mugabe á fólk, sum vóru komin á valfund hjá andstøðuni.

### Bangin fyri at tapa

Zimbabwiska stjórnin segði í morgun, at hon hevði ikki fingið nakra formliga fráboðan frá Morgan Tsvangirai um, at hann tekur seg aftur sum forsetavalevni, og Patrick Chinamasa, løgmálaráðharri, segði, at kemur eingin formlig fráboðan frá Tsvangirai, verður forsetavalið tann 27. juni sum ætlað.

Sjálvur var løgmálaráðharrin ikki í iva um, hví Tsvangirai tosar um at taka seg aftur.

- Hann er bangin fyri at tapa, og at ósigurin verður stórur. Fyri at sleppa undan tí hevur hann einki annað í at velja enn at taka seg aftur, segði løgmálaráðharrin. Hann endurtók, at fævr valnevndin ikki eina skriftliga fráboðan frá Morgan Tsvangirai, verður forsetaval fríggjadagin.

## STUTT SAGT

### Tvey ár at endurbyggja

Myndugleikarnir í Kina siga, at tað fer at taka teimum eini tvey ár at endurbyggja tað, sum fór í tí harða jarðskjálvtanum, sum var í síðsta mánaði. Wen Jiabao, forsætisráðharri, sum hevur vitjað jarðskjálvtaøkið fleiri ferðir, segði um vikuskiftið, at ætlanin er at fara undir at endurbyggja tað farna um nakrar mánaðir. Hann legði afturat, at ætlandi verður alt arbeiðið liðugt eina ferð í 2010. Tann harði jarðskjálvtin rakti Sichuan-landspartin sera meint. Umleið 60.000 fólk lótu lív, og uppaftur fleiri fingu skaða. Fleiri hundraðtúsund gjørdust heimleys.

### Brotsmaður til Haag

Stojan Zupljanin, sum var ovasti fyri bosniaserbisku trygdardeildunum undir borgarakrígnum í Bosnia, kom um vikuskiftið til Haag, har hann er ákærdur fyri krígsbrotsverk. Stojan Zupljanin, sum er 56 ára gamal, varð tikin í Serbia fyrr í hesum mánaðinum. Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur ákært Stojan fyri morð, etniska útreinskan og fyri at hava oyðilagt fleiri halgidómar hjá muslimunum í Bosnia. Stojan Zupljanin hevur staðið sum nummar fýra á listanum hjá dómstólinum í Haag. Framman fyri hann standa Radovan Karadzic, Ratko Mladic og Goran Hadzic.



*Stojan Zupljanin (v.m.) kemur nú fyri rættin í Haag*
*Mynd: Reuters*